**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



**TÍÐARGREININ**
*Tórbjørn Jacobsen*

# X Factor ella F Faktor

## - tørvur er á einum nýggjum jólafundi

Hóast Jóhannus og Hjalti telvaðu á hvør sínum borði í kvøld, annar hinumegin og hin hesumegin perluportrið, emotionelli trúboðarin versus ísakalda vísindamanninum, so prógvaðu sjónvarpsfólkini í kvøld, at tað ber til at gera viðkomandi og stak góðar sendingar í og úr føroyskum jørðildi. Upptøkurnar umborð á Magnusi Heinasyni, samrøðurnar við hin væl útborna Petur Steingrund, hini úr valaliðnum hjá Hjalta og samanumtøkan í kjakinum var ein frálík lektión og millumgonga viðvíkjandi tí faktorinum, sum mestur av øllum avgerð lív og líkindi tjóðarinnar. Fiskivinnan, og tað sum úr havinum kemur. Ein F Faktor.

Mest slitna hugtakið í landinum er útsøgnin hjá Heðini Brú: "Ongin býr í Føroyum av praktiskum orsøkum." Tað, sum stóri rithøvundurin í grundini sigur, er, at uttan mál, mentan og ein samleika, sum er sterkari enn materiella sigulmagnið handan høvini, verður øskukalt í Føroyum.

Fyri góðum tvey hundrað árum síðani var Svabo ivaleysur um, at føroyskum máli varð ikki lív lagað. Tærið hevur tó verið so frægt, at tað í eftirglóðini av europeisku tjóðskaparrørsluni – góð hundrað ár seinni - varð skipað fyri fundi í tinghúsinum. Somikið umráðandi hava menn hildið tað verið, at fremja dugandi leik tjóðini at frama, at teir bjóðaðu til fundar í tinghúsinum annan jóladag í 1888, har samráðast skuldi um at verja Føroya mál og Føroya siðir. Eitt slag av eini autorisatión ella ein formalisering av tí tjóðskaparrørslu, sum síðani kollvelti hugsan fólksins og broytti samfelagið út í tess ytstu liðir, ja, ein gigantisk national metamorfosa.

Úr hjørtum, barmum, hondum og heilum vaknaðu skøld, høvundar, listafólk av øllum handa slagi, tónasmiðir, tónleikarar, trúboðarar, kennarar, háskúlamenn, akademikarar, fróðskaparsetursmenn og týðarar. Tjóðarbyggingin fór akandi ígjøgnum samfelagið sum ein kulturellur bulldozari. Øll leiðin til mansins hjarta gekk ikki longur ígjøgnum búkin. Hetta var dubbing við lít. Bardúnurnar undir samleikanum herdust og tjóðin vaks í mekt og mæti. Undirstøðukervið hjá eini modernaðari tjóð í hesum úthavsoyggjum, í mun til meginlandið sunnanfyri, var lagt. Egin sigul so magnfullur, at hóttafall tóktist ikki at kunna koma á hann aftur.

Vit fingu bløð, skaldsøgur, upp í leypar av yrkingum, sjónleikir, heilagu skriftirnar á móðurmálinum, føroyskar skúlabøkur, týddar bøkur úr øðrum tungumálum, útvarp og sjónvarp. Onkursvegna tykist tað, sum at eftirglóðin frá jólafundinum var so væl trimmað, so væl kálvfødd, at føroyski samleikin stóð rákinum uttaneftir kurl og væl tað.

Teir eldru útvarpsmenninir, uppfløskaðir í elituskúlanum hjá Niels Juel Arge, plaga at taka til, hvussu teir argingarsamir plagdu at leggja eina plátu hjá Bamses Venner, Kaj Løvring ella Shu-bi-dua á grammofonina í døgverðatónleikinum, táið Finnbogi Ísakson hevði tíðindavakt, og var ávegis út úr studioklivanum aftur. Tá hann varnaðist hetta, skuldi hann illfýsin taka til: "Er tað ongin sum kann steðga hesum danska pjattinum?" Kreddan í Útvarpi Føroya var føroysk tjóðarbygging par exellance.

Í lýsingini ímorgun, nakað fyri morgunlesturin, fingu vit tey friðsælu gleðiboð frá kringvarpsstovninum, at ein, ið rópar seg Blackman, hevði givið føroysku songkvinnuni, Lindu Andrews, eina umbering fyri eina ónærisliga viðmerking í danskari boulevardavís. Sjálvsagt eitt triks, fyri at vaksa um onkran áhuga. Tað sigst annars, at hesin danski Blackman er sjefdomptørur í eini danskari undirhaldssending, í donskum sjónvarpi, har hendan Linda roynir seg sum karaoke songkvinnu. Danskt plagiatpjatt, sum onkursvegna savnar hina alt meira mentanarliga merglopnu donsku tjóðina. Ein danskur paralellur til skálatraðarpubbina Glitnir, har tað sigst, at ein og hvør glaður amatørur sleppur at syngja við sínum egna nevi. Líkamikið hvussu mangar rákar viðkomandi annars hevur fingið sær uppí nevið. Lívið er sjónleikur og breyð.

Tó ikki eittans. Undirstøðukervið skal røkjast og mennast áhaldandi. Varð spurdur um hesa tølandi X Factor sending, í eini morgunsending hjá Rás2, fyri fáum døgum síðani, og av góðum grundum bar tað illa til at gera neyvar viðmerkingar, fyrst og fremst tí at eg onki sjónvarp eigi, og í øðrum lagi, tí hugurin ikki stendur til danskt pjatt av hasum slagi. Til tað er lívið ov stutt og dýrabart. Táið eg nú av einhvørji orsøk hevði fingið eina mikrofon stungna uppundir nasaglugganar, nýtti eg høvið til, við mínum avmarkaða grundarlagi, at hugleiða eitt vet um støðuna á føroyska mentanarpallinum.

Tað finst ein dalsaki av mentanararbeiðarum í Føroyum. Reindyrkaðir idealistar tey flestu. Filantropar. Korini tey virka undir eru útssalig, hóast batar hava verið hesi seinastu árini. Støðan er kortini ring, og orsøkin er helst hon, at vit hava undirmett mentanarligu flóðalduna uttaneftir, í navninum hjá tí heilagu globaliseringini, sum nú eisini er ávegis at kollrenna materiuna í ótálmaðu kapitalismuni og rena hana ørmundarhúsið.

Javnvágin, sum teir gomlu nationalromantikkararnirmegnaðu at halda við síni framleiðslu, er skeiklað. Skeiva vegin. Vit hava fingið eitt mentanarligt undirskot í mun til magnfulla kontinentalsigulin, sum bítur seg fastari fyri hvønn dag sum gongur. Gerandisdagurin hjá okkum, sum nú liva, er so ófatiliga nógv øðrvísi enn hann var hjá ættarliðnum undan okkum. Tíðin frammanvert skígjgum og teldum økist, og serliga visuella megin ger, at hyggjarin til endans verður gøllhildin í einum fremmandum gerandisdegi. Samleikin trevsast og broytist síðani - til endans verður tú tað tú hoyrir og sært. Tá er stutt eftir, til tú gerst ein bastardur á tínum egnu lívslunnindum, og endar sum kúgv í flóri. Tað sigst, at tað er komið hartil, at føroysk børn í barnagørðum samskifta við danskari tungu, og tá er tað komið at teimum mørkum, at mann fer at leingjast aftur eftir fleiri ættarliðum í sama húski, har væl kálvføddar ommur sprændu anda- og mentanarligt føður inn í svanga og móttøkuføra mergin. Sjálvandi eitt nostalgiskt afturhvarv, men málið má loysast onkursvegna. Kanska við at nýta eitt støðugt vaksandi tal av pensionistum sum mentanarberar í vøggustovum og barnagørðum.

Miðlarnir, sum fylla almenna rúmið, gerast alt meira fremmandir. Serliga danskir. Loftsnældur varpa áhaldandi alt handa slag av undirhaldi niður yvir hesi hálvt hundrað túsund fólkini í norðurhøvum, sum bara eru her, tí at tey liva í einum sosialum solidariskum felagsskapi og tí at tey aka á sama mentanarliga og tjóðskaparliga undirstøðukervi. Orsøkin er ikki praktisk. Politisku viðurskiftini gera eisini, tað vita vit, at donsk kulturimperialisma, er ein sjálvsagdur lutur í politiska imperialistiska høpinum annars. Danir eru dystin lærdir í stjórnarkynstri, og júst hendan samanflættingin er klassisk. Men sum Jóanes Bóndi tók til, hví eru vit líka tolin hóast vit sjálvi verða stolin?

Onkur situr nú eftir við tí hugsan, at hetta er ikki annað enn national undirlutakensla. Grenj. Humbukk. Kridlin heimføði. Lat meg heldur rópa tað nationalar kaldar føtur. Tí vit hava ikki megnað, á sama hátt sum tey undanfarnu, at røkja og menna tjóðskaparliga arvin. Vit liggja fyri íla í tjóðarbyggingini. Tað kann politiska heimastýrisskipanin – hvat ilt ið hon annars er – gera nakað við. Men tað krevur orku og tað krevur íløgur. Og hartil, at hjørtu og heilar aftur fara at duka fyri føroyska samleikanum.

Føroyskt frálæringartilfar má og skal í alt størri mun út í føroysku skúlarnar. Ein almennur grunnur, ið framleiðir upp í bingjur, heldur enn til gløggar føroyskar barnaheilar, bara tí at lítið og onki samstarv er ímillum almenna og kommunala myndugleikan í landinum, má kikkstartast av nýggjum.

Og lat meg sláa tað fast við sjeytummaseymi, at táið eg av tingsins røðarapalli róði framundir, at kringvarpsgjaldið átti at verið tikið av, og stovnurin seldur fyri hægstbjóðandi, so stakst hetta uppá, orsakað av tí innansyndis argumentatión, at megnar stovnurin ikki at virka samsvarandi hugtakinum og ásetingini, sum gjørd er kring public-service høpið, so er legitimiteturin undir kringvarpsgjaldinum burtur. Tá virkar stovnurin á kommersiellum subjektivum støði, og eigur ikki frumburðarrættin til fólksins verðar. Mín hugsan er og hevur alla tíðina verið, at júst almennu stovnarnir, í núverandi kringvarpsstovninum, mega verða katalysatorarnir og bularnir í tjóðarbyggingini, og undir verandi umstøðum megna teir tað ikki. Tí eru føroyskt sjónvarp og føroyskt útvarp í alt størri mun vorðin slavustøð/ir hjá donskum ditto.

Samanleggingin av stovnunum gjørdist ein eklatant fiasko. Tað væntaðu vit frá byrjan, og tað kunnu tað vera mangar orsøkir til. Fóðurtunga sjónvarpið før sjálvsagt at drena figgjarliga mergin úr útvarpinum. Hetta var bara lættasta politiska loysnin frá tásitandi ráðharra, sum absolutt onga visión hevði viðvíkjandi samanlagda stovninum. Endamálið var, at sleppa undan at taka støðu um einum framtíðar føroyskum sjónvarpi viðvíkjandi, tí skuldi nýggja skrásetta parlagið lynna undir, at Svf kundi lalla víðari, soleingi nøkur oyru vóru eftir í kassanum hjá Arge senior, sála og Jespersen, sum legði kongin av politiska máttloysinum.

Kanska er stundin komin hagartil, at stovnarnir verða skeklaðir sundur aftur. Fyri at Útvarpið aftur fær sín avgerandi leiklut í føroyska samfelagnum, og síðani má og skal politiski mynugleikin á fyrsta sinni umrøða, og taka støðu til, hvat gerast skal við sjónvarpið, sum eigur at gerast ein magnfull støð, ið fær skeiklaðu javnvágirnar, í mun til fremmandu innrásina, í rættlag aftur. Hetta kostar hópin av peningi, men hetta er spurningurin um "to be or not to be". Ein íløga í framtíðina og okkara eftirkomarar sum ongin onnur. Hetta snýr seg um at skapa tann dráttin, sum heldur okkum í hesum landinum og ger okkum til eitt samfelag. Dragnar í hesum endanum, kann tað til endans vera líkamikið, um mann gongur ein sólvermdan vetrardag í gøtunum í Marbella heldur enn at snýsa upp í illsliga vátaslettingin í glyvratúnum.

Victor spurdi ikki eftir eini autorisatión frá Det Danska Bibelselskab áðrenn hann fór undir at týða Bibliuna. Mær vitandi, heldur ikki eftir at hann hevði týtt hana. Tí ber kanska til at siga, at hansara kolossali vilji og fullkomna óræddu dirvið vóru ólýðin móti formliga (danska) valdinum. Fólksins autorisatión var honum tó nógmikil, og tí gjørdist hann, umframt so mangt annað, málsligur oddviti í Føroyum. Fólkakirkjan varð skipað undir føroyskum málsræði fyri tíð síðan, og hóast málsligu úrmælingarnir Dahl og Viderø, á sama hátt lógu í broddi fylkingar, so er Bíblia teirra framvegis undir fremmandum ræði. Fer tú inn á leitimaskinuna hjá Ebenezer ella Bispagarðinum, og klikkir teg inn á heilagu skriftirnar, tá endar tú alt í einum inni á heimasíðuni hjá Det Danske Bibelselskab. Soleiðis kemur til sjónar, hvussu máttmikið inerti´ið er, táið mann altíð og stund skal laga seg eftir kørmunum, sum onnur seta fyri tær. Annars vóni eg, at okkara frálíki biskupur fær flutt hendan partin av kirkjuliga høpinum undir føroyskt domæne sum skjótast. Eitt kuriosum, sum vert er at hugsa um, táið grundað verður um ferðina í tjóðarbyggingini, og hvussu tað ber til at áseta karmarnar sjálvur og at flyta seg eftir egnum málum, visiónum og hugsjónum.

Stundin er komin til ein nýggjan jólafund. Sum fyri alt í verðini ikki má fyriskipast í partapolitiskum regi, tí tjóðina eiga vit øll. Vit mega finna fram til, hvussu rúmliga vit skulu íleggja til frama fyri mál, mentan og samleika. Sum Jens Pauli Heinesen sigur tað so vakurt, í endanum á meginskaldsøgu síni: "Stundin er komin til nýtt siðaskifti, ein nýggjan kopernikuslátur. Rekið menniskjað út úr skýmaskotinum. Setið meg oman fyri náttúrulógirnar og latið tarvin liggja á biti við mína lið."

Og kanska rakar hann uppaftur betur í solar plexus, í løðarsteininum, sum hann hevur lánt frá Alexanderi Solsjenitsyn: "Um tjóðirnar skuldu horvið, fer hetta at gera okkum í minsta lagi líka so fátæk, sum fóru øll menniskju at verða púra eins, við sama persónleika og somu útsjónd. Tjóðirnar eru menniskjans ríkidømi, tjóðin er menniskjans kollektivi persónleiki. Sjálvt tær allarminstu hava sín serliga lit og rúma í sjálvum sær eitt serligt frábrigdi í tí guddómliga stavnhaldinum."

Politiska skipanin hevur í eitt gott ár havt skilagóðu og kvalifiseraðu frágreiðingina hjá Málstevnunevndini, Málmørk, liggjandi sum dustsúgvara í sínum goymslum, kanska hevði eitt aðalorðaskifti um hana verið løðarsteinurin yvir um ánna, til tær stóru avgerðirnar, sum mega takast og fremjast í verki, skal tjóðin ikki smokka í fremmanda mýrulendinum, sum nú kennist meira hóttandi enn nakrantíð.

Vit hava átrokandi tørv á einum F(øroyskum) Faktori - heldur enn einum X Factori.

Tíðargreinin